# lkamera í Seattle




*- Vit hava brúkt eini 4-5 ár til at koma higar, vit eru komin nú, og hesi árini hava vit havt tríggjar versjónir av skipanini við ymiskum teknologiskum broytingum og optimeringum. Nú kunnu vit ósmædnir siga, at vit hava eitt professionelt produkt, siga Sofus Gregersen og Rúni Petersen*

royndini at fremja burðardygga veiði, er so komið aftrat, siga teir báðir.

Kristian Zachariassen, sum starvast á Havstovuni, hevur áður sagt, at í øllum royndum, sum stovnurin ger við troli, er kameraið við.

- At trola við ongum kamera er, sum at arbeiða upp á ein bil við bindi fyri eyguni, hevur hann sagt.

Umboð fyri JT electric vóru eisini í Hetlandi í heyst og vitjaði feløg, sum hava uppisjóvarskip.

- Hetta vóru skip, sum eitt nú fiska sild og makrel, og kanska serliga við makreli hevur kameraið teirra áhuga. Kvotan er lítil, og kunnu skipini skilja smáa makrelin burtur úr við skiljirist ella skiljineti, meðan tey fiska, er nógvur peningur at vinna.

### Harris Electric

Rúni Petersen og Sofus Gregersen siga, at áhugi er fyri trolkameranum bæði í Evropa og USA.

- Vit fáa eisini fyrispurningar úr øðrum fjarskotnum londum í eitt nú Suðuramerika og Ruslandi, leggur teir aftrat.

JT electric hevur góðar vónir um at selja fleiri trolkamera, soleiðis sum tíðin gongur.

- Umframt góða samstarvið, vit hava við Vónina, hava vit eisini etablerað okkum við onnur feløg úti í heimi, sum eru veitarar til fiskiskipaflotan.

Soleiðis hevur fyritøkan á Kambsdali eisini etablerað seg við amerikanska felagið, Harris Electric, sum hevur eini sjeyti ár á baki, og er ein dugnaligur og álítandi samstarvspartur.

- Harris Electric selir okkara skipan og veitir eisini neyðugu tænastuna í økinum. Tað er ein fyrimunur fyri okkara viðskiftafólk á hesum marknaðinum, at ein fyritøka, sum annars selir skipsútgerð og hevur nógv viðskiftafólk, eisini hevur okkara skipan í sínum vøruútboði.

Á Pacific Marine Expo í Seattle vóru Harrie Electric og JT electric á felags bási.

- Vit hava brúkt eini 4-5 ár til at koma higar, vit eru komin nú, og hesi árini hava vit havt tríggjar versjónir av skipanini við ymiskum teknologiskum broytingum og optimeringum, tó at grundarlagið hevur verið hitt sama. Nú kunnu vit ósmædnir siga, at vit hava eitt professionelt produkt, ið sær út av nøkrum.

Báðir eru teir samdir um, at trolkameraið í dag hevur eitt snøgt skap, soleiðis at viðskiftafólkini kunnu kenna seg at hava eitt dygdargott og "lekkurt" tól, sum stór nytta kann fáast úr.

- Úrslitið av framsýningini í Seattle var yvirraskandi gott. Vit seldu fimm trolkamera á sjálvari messuni, umframt at vit fingu nógvar fyrispurningar og áhugaverd sambond við viðskiftafeløg, siga Rúni Petersen og Sofus Gregersen hjá JT electric á Kambsdali.

Fólk, sum vilja vita meiri um JT electric og trolkameraið, kunnu leita umvegis heimasíðuna www.jt.fo

vilmund@sosialurin.fo




**»... úrslitið av framsýningini í Seattle var yvirraskandi. Vit seldu fimm trolkamera á messuni, umframt at vit fingu nógvar fyrispurningar...**